# arknaðurin fer at batna





*Marner Lisberg, nevndarformaður í Sandoy Seafood*

Nevndarformaðurin sigur, at lítið av fiskaarbeiði var á virkinum á Sandi í fjør, tí lítil og eingin toskur hevur verið at fingið, og marknaðurin fyri saltaðan upsa hevur verið vánaligur.

- Toskurin bleiv meira ella minni burtur úr fiskiskapinum hjá skipunum og tann fiskur, sum kortini hevur verið á marknaðinum, hevur verið dýrur at fingið hendur á.

Hann sigur, at marknaðurin fyri saltaðan upsa hevur verið vánaligur, eitt nú tí, at kreppa hevur verið í Brasiliu, har Sandoy Seafood hevði ein marknað fyri sínar vørur.

- Men marknaðurin broytist alla tíðina, og nú gongur betur í Brasiliu. Tí meta vit, at ein ávísur møguleiki er fyri, at landið aftur verður áhugavert í hesum sambandi. Sama er við Karibiu, sum eisini hevur keypt saltaðan upsa.

Marner leggur dent á, at hann er ikki framleiðsluleiðari og ikki framleiðslukønur í Sandoy Seafood, men hann heldur, at tað sær heldur betur út við marknaðinum fyri saltaðan upsa.

- Vit kenna framleiðsluna og vita, hvat hesi londini vilja hava. So, vit vænta, at her verður okkurt at heinta hjá okkum, sigur hann.

## Áhugi fyri upsa

Marner heldur, at áhugin fyri upsavørum sum heild er veksandi aftur í Evropu, nú so nógvur upsi fer eystureftir.

- Russar eru farnir at keypa nógvan upsa, sum teir vilja hava heilan, tí fiskurin er bíligari at framleiða í Ruslandi enn her um okkara leiðir. Hetta merkir so aftur, at minni upsi verður á evropeiska marknaðinum, sum aftur væntandi fer at føra til størri eftirspurning – og harvið eisini betri prís fyri upsavørur.

Hann ásannar tó, at upsin verður seldur á marknaðinum í harðari kapping við eitt nú alaska pollock, nú dollarin er so lágur.

- Eg dugi ikki at síggja, at upsaprísirnir kunnu fella uppaftur meira. Nú er bert ein vegur, og tað er uppeftir. Fæst ikki meira fyri upsan, nú so lítil toskur er uppi í veiðini, verður einki grundarlag undir skipunum heldur, sigur Marner.

Ein stórur partur av framleiðsluni, sum virkað verður í Skopun, verður seld til Týsklands og Fraklands.

## Útróðurin týdning

Spurdur, hvønn týdning útróðurin í Sandoynni hevur, sigur Marner Lisberg, at tá ið hampiligur útróður er, ger hesin fiskurin góðan mun í framleiðsluni.

- Men nú so lítil toskur er at fáa, er útróðurin yvirhøvur slakur.

Hann vísir á, at bátar, sum royna á Norðhavinum, hava latið illa at, og tá ið hetta er í bestu vártíð, bendir mangt á, at toskurin ikki er best fyri í løtuni.

Nevndarformaðurin vísir á, at høvuðsgrundarlagið undir rávørutilgongdini hjá Sandoy Seafood hevur verið upsin, sum teir tríggir trolararnir, Eysturbúgvin, Nornagestur og Kolumbus, hava fingið.

- Vit vóna, at hesi skip framhaldandi verða høvuðsgrundarlagið undir rávørutilgongdini hjá virkjunum í Sandoynni, sigur Marner Lisberg at enda.

## Minni skuld - betri útlit

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrr í ár eydnaðist Sandoy Seafood at fáa í lag avtalu við lánveitarar um eina loysn, soleiðis at felagið kundi koma burtur úr fíggjarligu kreppuni, eftir at raksturin hevur givið hall seinastu tvey árini.

Tríggjar miljónir krónur í partapeningi vóru í felagnum, men hesin peningur er nú skrivaður niður á null. 4,5 miljónir krónur í nýggjum partapeningi eru teknaðar, og eins og frammanundan er Detla Seafood høvuðspartaeigari.

Arbeiðarafeløgini og Vinnugrunnurin á Sandi áttu áður í felagnum, men tey eru ikki við longur.

Nýggir partaeigarar eru P/F Nr. 14, sum Poul Mohr eigur, skipini í Sandoynni, Eysturbúgvin, Nornagestur og Kolumbus, P/F Vesturvón, nakrir smærri eigarar og fiskasølur.

2,5 miljónir krónur av stuttfreistaðu skuldini er lagt um til ábyrgdarpening, og langfreistaða skuldin er niðurskrivað úr stívliga 18 miljónum krónum niður í 9 miljónir krónur.

Sandoy Seafood hevur havt stóran týdning fyri Sandoynna, tí øll árini síðan 1997 hevur virkið goldið millum 20 og 25 miljónir krónum í lønum um árið.

### Góðar vónir

– Eg vóni, at hetta fer at ganga, og tað vænta hinir parteigararnir sjálvsagt eisini, sigur nevndarformaður, sum er fegin um tann góða vilja, sum lánveitari og parteigarar hava víst felagnum í truplu støðuni, sum var íkomin.

Marner Lisberg sigur, at nú lánsbyrðan er minni, skuldi raksturin av virkseminum verður léttari.

- Vit fara øll at gera okkara best fyri, at virkseminum á virkjunum í Sandoynni nú verður lív lagað, sigur nevndarformaðurin.